# Dyrnar opnar fyri nýggjum møguleikum

**Jákup Mikkelsen hevur skrivað eitt ára sáttmála í Skotlandi, sum ikki verður longdur, um umstøðurnar ikki verða øðrvísi**

ÚTISETA SÁTTMÁLI
*Jóannes Hansen*



Mikudagin gjørdist tað veruleiki, sum hevur verið í umbúna síðstu stóru vikuna. Jákup Mikkelsen skrivaði undir sáttmála við Partick Thistle í bestu skotsku deildini. Harvið er greitt, at føroyingar aftur við serligum áhuga hava orsøk at fylga við í skotsku landskappingini, sum fer at bakkastokki leygardagin 9. august. Tá skal Partick spæla á heimavølli ímóti Livingston.

Jákup kemur heim til Føroya at venda í vikuskiftinum. Mikudagin skal hann til Írlands á venjingarlegu saman við nýggju liðfeløgunum. Hann fer einsamallur avstað aftur. Fam-iljan verður eftir í Klaksvík. Sáttmálaskeiðið hjá Jákupi í Glasgow felagnum er eitt ár.

– Fyri meg er tað stór avbjóðing at fáa møguleikan at spæla í Skotlandi. Tað havi eg havt ein lítlan dreym um, síðani tað, tá ið eg spældi í Herfølge, segðist, at Hibernians úr Edinburgh var áhugað í at knýta meg at felagnum. Tá hoyrdi eg bara um hetta í pressuni, men seinni fann eg út av, at tað var veruleiki aftanfyri tilboðið, sum Herfølge ikki hevði kunnað meg um. Tað var eg vónbrotin um, men nú er møguleikin har.

Væntar tú at vera fleiri ár í Skotlandi?

– Ikki undir teimum umstøðum, sum verða galdandi fyri næsta árið. Hetta er upp á ein máta eitt royndarár. Men tað ber ikki til, at eg skal vera burturi frá konuni og børnunum í fleiri ár. Um eg skal halda fram aðra staðni, so skal sáttmálin vera soleiðis, at familjan kann búgva saman við mær, sigur Jákup Mikkelsen, sum 14. august fyllir 33 og harvið framvegis átti at havt nøkur góð ár á sum málverji á hægsta støði.

Tað er lagt upp til, at Jákup skal verja málið í tveimum teimum fyrstu landskappingardystunum. So verður málverjin, sum hann er keyptur sum avloysari hjá, væntandi tøkur aftur eftir knæskaða.

– Tá verður tað tann, sum venjarin fer at meta sum tann betra málverjan, sum fer at fáa møguleikan í málinum. So tað er eitt hjá mær at gera, og tað er at spæla alt tað, sum eg eri mentur, ásannar Jákup Mikkelsen.

At Jákup nú er komin til bretstkan fótbólt letur upp fyri nýggjum møguleikum,

*– Málið er fyrst og fremst at varðveita plássið í bestu deildini. Um tað eydnast at røkka sætta plássinum og harvið at vera við í endaspælinum um meistaraskapin, so verður tað mett at vera framúr, sigur Jákup Mikkelsen*

sum kunnu gerast til veruleika, um føroyski landsliðsmálverjin megnar at spæla upp til sítt besta. Partick Thistle er eitt av minni feløgunum í bestu skotsku deildini. Teir fluttu upp síðsta summar, og hetta fyrsta kappingarárið í bestu deildini skarst tað eftir umstøðunum væl.

– Málið er fyrst og fremst at varðveita plássið í bestu deildini. Um tað eydnast at røkka sætta plássinum og harvið at vera við í endaspælinum um meistaraskapin, so verður tað mett at vera framúr, sigur Jákup Mikkelsen.

Tað er áður sæð, at spælarar, sum fyrst hava roynt seg í smærru skotsku feløgunum, skjótt eru seldir víðari til eitt av stóru feløgunum í Skotlandi ella til okkurt felag í bestu ella næstbestu deildini í Onglandi. At Jákup nú hevur fingið møguleikan í Partick letur eisini upp fyri hesum møguleikanum. Tí er tað ivaleyst soleiðis, at avbjóðingin hetta næsta árið verður tann síðsta hjá Jákupi uttanfyri landoddarnar, ella at hetta verður fyrsta blaðið í spennandi kapitli í bretska fótbóltsheiminum.

### Triðja felagið

Tað var eftir steypafinaluna í 1994, tá ið KÍ hevði vunnið 2–1 á B71, at Jákup Mikkelsen fór til Danmarkar at royna seg sum fótbóltsspælari. Hann fór at venja í Herfølge, har hann skjótt var annar maðurin í kappingini um plássið millum stólparnar. Hæddarpunktið í Danmark var tíðliga á sumri í 2000, tá ið Herfølge púra óvæntað – ikki minst tí Jákup Mikkelsen var so framúr sum málverji – vann meistaraskapin.

Árið eftir gekk alt av skriðuni, Herfølge flutti niður, og Jákup kendi tað soleiðis, sum tíðin hjá honum í Herfølge var liðug. Fyri tveimum árum síðani flutti hann til Molde, og har hevur hann verið síðani.

Jákup hevur fýra ferðir roynt seg í týdningarmiklum dystum ímóti skotskum liðum. Hann vardi føroyska málið á Pittodrie leikvøllinum í Aberdeen, tá ið Skotland 14. oktober í 1998 vann EM undankappingardyst ímóti Føroyum 2–1, og hann var aftur málverji, tá ið Føroyar grundlógardag í 1999 á heimavølli megnaðu 1–1 ímóti Skotlandi (tað var ta ferðina, at Hans Fróði Hansen javnaði í evstu løtu við fínum stútara). Tá í Herfølge royndi seg í undanumfari til Europa Cup fyri meistarar á sumri í 2000, var Glasgow Rangers mótstøðuliðið. Jákup vardi málið í báðum dystunum, sum Rangers vann sannførandi.

Hóast Jákup fleiri ferðir hevur staðið andlit til andlit við skotsk lið, so hevði hann ikki roknað við, at skotskur miðal liðfótbóltur var á tí støðinum, sum hann hesa seinastu vikuna hevur verið vitni til. Týsdagin segði hann í blaðnum, at hann var ovfarin av, hvussu tekniskan og hugflogsríkan fótbólt nýggju liðfelagarnir høvdu sýnt undir venjing og í venjingardystunum.

– At ferðin var høg, visti eg av, men hana má eg nú rættuliga venja meg við, sigur Jákup Mikkelsen.

# FCK skal til Malta

**Maltesiska liðið Sliema Wanderers megnaði óvæntað at basa Skonto Riga úr Letlandi og skal nú møta FCK í næsta umfari**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Todi og liðfelagar hansara í FCK eru farnir undir fyrireikingarnar til Champions League, og nú er greitt, at danska meistaraliðið skal møta maltesiska liðnum Sliema Wanderers í næsta umfari.

Sliema Wanderers megnaði heldur óvæntað at vinna á Skonto Riga í fyrsta umfarinum. Sliema vann heimadystin 2-0, og seinni dysturin endaði við 3-1 sigri til Skonto Riga. Maltesar komu sostatt víðari við at hava skotið fleiri mál á útivølli.

Skonto Riga førdi annars 3-0 í heimadystinum og stóð til at koma víðari, men so fekk Sliema tað altavgerandi útivallarmálið í evstu løtu eftir beinleiðis fríspark.

Fyrri dysturin millum FCK og Sliema Wanderers verður spældur í Parkini tann 30. juli, og returdysturin verður eina viku seinni niðri á Malta.

Í triðja og síðsta undanumfarinum til Champions League kann FCK møta sera sterkari mótstøðu. Talan er um lið sum Chelsea, Newcastle, Deportivo la Coruna, Lazio, Dortmund og onnur stórlið. Tó kann hepni vera við FCK, og teir fáa eitt veikari lið í síðsta umfarinum, um tað eydnast vinna á Sliema.

### Íslendingar ov stuttir

Íslendsku meistararnir KR úr Reykjavík megnaðu ikki at koma víðari hesuferð. KR møtti FC Pyunik úr Armenia, og armenska meistaraliðið vann 2-1 samanlagt.

FC Pyunik vann fyrra dystin 1-0 á heimavølli, og seinni dysturin, sum varð spældur á Laugardalsvøllinum í Reykjavík, endaði 1-1.

Armenar komu framum miðskeiðis í seinna hálvleiki, og so skuldi KR hava trý mál fyri at koma víðari. Bjarki Gunnlaugsson javnaði við brotssparki, men tað batti einki uppá støðuna hjá íslendingum.

# KÍ vitjar HB á Ólavsøku

**Nýggi álopsspælarin hjá KÍ verður fyrstu ferð sýndur fram, tá ið klaksvíkingar skulu spæla ímóti HB Ólavsøkuaftan**

ÓLAVSØKU-FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*




Stóri fótbóltsdysturin á Ólavsøku verður sjálvandi finalan um Løgmanssteypið, sum verður spæld Ólavsøkudag klokkan 15.30. Tá fara B36 og GÍ at takast um, hvat av hesum báðum feløgunum skal verða tað fyrsta at eiga tveir lutir í steypinum, sum tað hevur verið spælt um síðani 1999. Hetta fer at verða gjørt meiri burturúr í morgin.

Síðani steypafinalan fyri tveimum árum síðani fyrstu ferð varð spæld Ólavsøkudag hevur fótbóltsdysturin Ólavsøkuaftan staðið í skugganum, men fyri viðhaldsfólkini hjá feløgunum, sum eru partur av dystinum, er tað sjálvandi áhugavert.

Hesa ferð hevur HB, sum mikukvøldið gjørdi Europa Cup luttøkuna á hesum sinni burturav sær, bjóðað klaksvíkingum at spæla. HB og KÍ hava spælt á Ólavsøku óteljandi ferðir, og áskoðararnir hjá feløgunum báðum plaga at leggja nógv fyri.

KÍ kemur mánakvøldið í høvuðsstaðin við nýggjum álopsspælara. Jacob Bymar kom fyrst mikudagin til Klaksvíkar, og hann fer at hava vant einar tríggjar ferðir saman við nýggju liðfeløgunum, áðrenn havnartúrin. Hann hevur fingið troyggjuna við 9–talinum. Tað man boða frá, at í KÍ síggja teir unga jydan sum fremsta álopsmannin, meðan Hjalgrím Elttør og aðrir skulu stuðla honum, og Ove Nysted kanska fyri tað mesta verður í miðverjuni.





*Blaðútberarar, ið eru úttiknir til U17 landsliðið, inni á Prentmiðstøðini, f.v. Ólavur í Ólavsstovu, Christian R. Mouritsen, Pætur T. Jørgensen, Ásbjørn V. Gunnarsson, og Jóhan V. Gunnarsson. Saman við teimum eru, Eyðun Húsgarð, stjóri á Prentmiðstøðini og Hallstein Sigurðsson, samskipari fyri flutning og útbering*

# Blaðútberarar úttiknir til U17-landsliðið

Síðan Prentmiðstøðin í Havn byrjaði virksemi sítt í 2000, hava nógv ungfólk arbeitt fyri hesa fyritøku, summi pakka bløðini og onnur bera tey út til haldarar. Tað eru tey stóru tíðindabløðini, Dimmalætting og Sosialurin, sum eiga Prentmiðstøðina, sum hevur til uppgávu at prenta bløðini og bera tey út til handlar og haldarar kring landið. Fyrstu tíðina vóru tað bert leygardagsbløðini, sum vórðu borin út hvørt fríggjakvøld. Síðan apríl 2001 hava bløðini verið borin út hvørt kvøld í vikuni í Havnini. Tilsamans 180 ungfólk kring landið arbeiða fyri Prentsmiðjuna. Stjóri á Prentsmiðstøðini er Eyðun Húsgarð, og samskipari fyri flutningi og útberingina er Hallstein Sigurðsson. Prentmiðstøðin prentar eisini nogv onnur bløð.

Nógv av teimum ungu, sum ganga við bløðum, eru eisini ítróttarfólk, tey svimja, spæla hond- og fótbólt o.a. Herfyri vórðu nakrir av dreingjunum, sum arbeiða fyri Prentmiðstøðina, úttiknir til U17-landsliðið í fótbólti. Dreingirnir, sum vórðu úttiknir og arbeiða fyri Prentmiðstøðina, eru: Pætur T. Jørgensen í HB, Ólavur í Ólavsstovu í HB, Christian R. Mouritsen í HB, Ásbjørn V. Gunnarsson í B36 og Jóhan V. Gunnarsson í B36. Hóast hesir dreingirnir eru nógv upptiknir við venjing o.a., hava teir tíð at arbeiða fyri Prentmiðstøðina og ganga við bløðum. Teir eru glaðir fyri hetta arbeiðið, sum gevur teimum pening, ið teir sjálvir ráða yvir.

U17-landsliðið skal luttaka í NM-kapping í Noreg frá 26. juli til 4. august. Teir, sum vórðu útiknir til U17-landsliðið, eru: Bárður Mittelstein, Poul Thomas Dam, Christian R. Mouritsen, Pætur T. Jørgensen, Ólavur í Ólavsstovu, Tróndur Kragesteen, HB. Jóhan Davidsen, Einar Hansen, NSÍ. Borgar Kristiansen, Skála. Urbanus Olsen, Kristoffur Jacobsen, KÍ. Jóhan V. Gunnarsson, Ásbjørn V. Gunnarsson, B36. Jón Krosslág, VB. Sam Jacobsen, Per Jacobsen, GÍ. Andreas Lava Olsen, Rógvi Ryggshamar, LÌF.

Við í ferðalagnum verða hesi við sum leiðarar og hjálparfólk: Rúni Heinesen, ferðaleiðari, Bill Mc.Leod Jacobsen, venjari. Heðin Askham, hjálparvenjari. Thom Jakobsen, liðleiðari, Fanny Kruse, fysioterapeutur, Oddmar Andreasen, dómari, Henry Heinesen, hjálpari.

Ferðalagið fer úr Føroyum leygardagin 26. juli til Oslo, og koma tey heim aftur mánadagin 4. august.

**Dystirnir teir skulu spæla verða hesir:**

Týsdagin 29. juli
Føroyar-Skotland

Mikudagin 30. juli
Svøríki-Føroyar

Fríggjadagin 1. august
Føroyar-Finland

Sunnudagin 3. august
Plaseringsdystur

Frá Prentmiðstøðini verður sagt, at hóast áhugin er stórur fyri at ganga við bløðum, eru øll áhugaði vælkomin at seta seg í samband við teir á teldupostadressuni:
prent@prent.fo.
og skriva navn, bústað, telefon og aldur. Tey, sum ganga við bløðum, skulu hava fylt 13 ár.

